SEV heldur lítið um 4-mannaálitið:

Ófullfíggjað og tendentiøs nýtsla av litteraturi og observatiónum

Kostnaðurin av útbygging í erva í Eysturoynni undirmettur við 60-65 mió. kr.

Tann útbygging, sum 4-mannabólkurin skjýtur upp, kann ikki, hvørki búskaparliga, tekniskt, umhvørvisliga ella trygdarliga metast við útbyggingina sum SEV er farið undir, sigur SEV-leiðslan

Leiðslan í SEV hevur nú latið við seg koma og gjørt viðmerkingar til álitið um alternativa vatnorkuútbygging í Eysturoynni, sum ein 4-mannabólkur gjørdi fyri landsstýrið herfyri.

SEV hevur ikki stóra virðing fyri tí arbeiði, sum hesin 4-mannabólkurin hevur latið úr hondum. Vendingar sum »ófullfíggjað og tendensiøs nýtsla av litteraturi og observatiónum« er eitt av skoðsmálunum, SEV gevur hesum fýra.

Hetta kom fram á einum tíðindafundi, sum SEV skipaði fyri hósdagin. Á hesum fundi vóru allir »topparnir« í SEV tilstaðar, SEV-stýrið, SEV-leiðslan og formaðurin í Umboðsráðnum.

Endamálið við tíðindafundinum segði formaðurin í SEV-stýrinum vera: at greiða frá SEV's støðu til tað, sum í seinastuni er komið fram um útbygging av vatnoynni í Eysturoynni, t.v.s. viðmerkingar til álitið frá 4-mannabólkinum.

Kanningar gjørdar

Fyrst greiddi Arnstein Niclasen, formaður í SEV-stýrinum frá søguligu gongdini í orkuútbyggingarmálinum, og segði m.a., at hvat viðvíkur spurninginum um at útbyggja í hæddini, so metti Orkuráðið í 1984, at møguleikarnir at byggja út við samlitunlum í umleið 300 m hædd í norðara parti av Eysturoy áttu at verið kannaðir.

SEV fór tí undir kanningar í 1985, og úrslitið av kanningunum varð latið landsstýrinum sama ár.

Í januar 1986 gjørdi landsstýrið so av at seta teir fýra: Boga Hansen, Magnus Danielsen, Sten Balle og Hans Olávus Danielsen at kanna henda sama spurning og varð eitt álit latið landsstýrinum 1. februar í ár.

Klæmint Weihe, SEV-stjóri og Elias Davidsen, projektleiðari fyri vatnorkuútbyggingina í Eysturoynni komu síðani við viðmerkingunum til álitið hjá 4-mannanevndini.

Niðurstøðan av viðmerkingum SEV's til hetta álitið eru m.a.:

— at niðurstøða 4-manna bólksins um avfallsnøgdirnar í teimum ymisku hæddunum er grundað á ófullfíggjaða og tendentiøsa nýtslu av litteraturi og observatiónum

— at nevndin sær burtur frá, at ein minimal vatngoymsla og tær longu opnu veitirnar, uttan iva vilja økja munandi um vatnspillið

— at kostnaðurin av at gera nevndu útbygging í erva er nógv undirmettur

— at 4-manna bólkurin als ikki viðger teir fyri SEV so avgerandi praktisku trupulleikar og meirkostnað, sum stendst av at reka eitt so stórt og næstan óregulerað vatnorkuverk í samkoyring við ta frammanundan sera kompliseraðu orkuframleiðsluskipan, sum SEV hevur.

SEV sigur síðani, at tað er teirra áskoðan, at ein útbygging, sum 4-manna bólkurin hevur skotið upp, ikki búskaparliga, tekniskt, umhvørvisliga og trygdarliga kann metast við útbyggingina, sum SEV er farin undir.

Um grundirnar til hesa niðurstøðu kemur SEV m.a. til:

Vatngoymslustødd

Tann neyðuga vatngoymslustøddin í Eysturoyar útbyggingini hongur neyvt saman við tí, ið er frammanundan, bæði av vatnorku og dieseltólum. Tað hevði verið ábyrgdarleyst at ásett vatngoymslustøddina út frá teoretiskum metingum uttan at hugsa neyvt um tær praktisku rakstrarroyndir við verandi skipan, sum í mun til støddina er ógvuliga trupul.

Av topografiskum grundum er vatnorkan í Vestmannaøkinum býtt upp í ikki minni enn tríggjar støðir og 4 brunnar, sum tveir og tveir eru sínámillum tengdir at hvørjum øðrum.á

Henda bundna støða og støddin á turbinunum geva bindingar í rakstrinum, sum saman við teimum stóru broytingunum í avfallinum seta stór krøv til raksturin av dieselverkunum.

Tað skal í hesum sambandi nevnast:



Samandráttur

Hetta álit er úrslit av kanningum, sum Føroya Landsstýri hevur biðið undirritaðu gera í samband við vatnorkuútbygging í Eysturoy. Kanningin, ið gjørd er, fevnir um vestaru síðu av Eysturoynni. Í frágreiðingini eru úrslit, sum lýsa, á hvønn hátt mest møgulig elorka fæst úr vatninum í hesum øki, og hetta er borðið saman við ta orkunøgd, sum fæst við tí ætlan, sum SEV hevur fyri økið.

Avgerandi fyri orkunøgdina er, hvussu stór fallhæddin er, og tessvegna í hvørji hædd vatngoymslan verður bygd. SEV ætlar at byggja Eiðisvatn upp til 149m hædd at nýta til vatngoymslu.

Okkara kanningar vísa hinvegin, at **munandi meiri orka fæst við at leggja vatngoymsluna í 300-350 metra hædd**. Samstundis vísir nýtt korttilfar, at **góðir møguleikar eru at gera vatngoymslu í hesi hædd**, t.d. við Eiðisskarð.

Við støði í hesum kanningum er uppskot gjørt við vatngoymslu á hesum stað við bygging í 335 metra hædd. Hetta uppskot er borðið saman við ætlanina hjá SEV, Eiði I, har Eiðisvatn er byrgt upp til 149 metra hædd. Við tí kunnleika, sum er til avfall í Føroyum, ber ikki til at gera neyvar útrokningar av vatnorku, men alt bendir á, at orkuvinningurin við at leggja vatngoymsluna í erva verður 30-50% í mun til at leggja hana í neðra, t.v.s. ein vinningur í orku uppá 7-12 milliónir kWh um árið fyri øki 1A og 1B, alt eftir hæddarvøkstrinum í avfallsnøgdini.

Tað uppskot til útbygging í erva, sum vit hava gjørt, vísir harafturat, at ein nóg stór goymsla til øki 1A og 1B kann gerast á nevnda stað fyri 40-45 mill. kr., og at **uppskotið við tunnlum og vatngoymslu í erva, sum heild kostar á leið tað sama, sum ætlanin hjá SEV í neðra**. Í øllum førum kemur ein møguligur munur at vera so lítil í mun til øktu inntøkurnar, ið stava frá øktu orkuframleiðsluni, at hann ongan týdning hevur.

Vit hava harafturat kannað eftir, at tað ber til at knýta sýðru økini 2A og 2B uppí hetta uppskot. Hetta er helst ikki besti mátin at byggja hesi øki út, men tó gevur hann eisini millum 30% og 50% meiri orku enn SEV ætlanin fyri øll fýra økini gevur. Í orku er hetta millum 16 og 23 milliónir kWh, sum kunnu vinnast við at byggja alt økið út í erva heldur enn í neðra.

Afturat hesum kunnu nevnast hesir fyrimunir við at byggja í erva: *Eiðisvatn fær fríð vatnnøgdin, sum verður nýtt minkar munandi og við tí ávirkanin á firðirnar og álíngina og bert 100.000 m²* av haga verða tikin til vatngoymslu í mun til teir 700.000 m², sum hækkingin av Eiðisvatni tekur.

Sum heild meta vit at hava ávíst, at fyrimunirnir við at byggja Eysturoy út í erva heldur enn í neðra eru eyðsýndir. Vit mæla tí til, at projekt verður gjørt samsvarandi hesum.

Tórshavn 2. Februar 1986

Bogi Hansen
Magnus Danielsen
Sten Balle

Hetta er samandrátturin av álitinum, sum Sten Balle, Magnus Danielsen, Bogi Hansen og Hans Olávus Danielsen hevurfyri gjørdu fyri landsstýrið og sum SEV skírir ófullfíggjað og tendentiøst arbeiði.